VI‹MERKINGAR

Nakrar huglei›ingar um or›i› »tjó›«

Jóannes Eidesgaard

Løgma›ur og forsætismálarár›harrin skylda bá›ir føroyingum eina frágrei›ing um, hví teir hava tosa› framvi› hvørjum ø›rum. Annar spyr í eystur, og hin hann svarar í vestur, og so eru bá›ir partar eftir øllum at døma samdir um at lata standa til.

Seinastu tí›ina hevur rættiligt or›askifti tiki› seg upp um føroyska or›i› tjó› ella danska or›i› "nation". Hetta kemst fyrst og fremst av, at tí›indi frá okkara samrá›ingarfólkum eftir seinasta umfar í samrá›ingunum søgdu okkum, at nú vildi danska stjórnin ikki so frægt sum vi›urkenna okkum sum eina tjó› ella nation, solei›is sum teir málbóru seg. Hin vegin fingu vit so ikki at vita, hvat vit so vóru. Men solei›is sum tí›indini vór›u framborin, so fekk ein ta fatan, at ein føroyingur var ikki ø›rvísi enn ein borgari í Høje Tåstrup ella í Ribe Amt.

Og fyri okkum, sum heima sótu, vóru hetta skelkandi tí›indir. Tí sjálvandi eru vit ein tjó›, eitt fólk ella ein nation, um tú vilt. Vit hava frá barnsbeini trú› og hildi› okkum vera eina tjó›, og solei›is skal ta› framhaldandi ver›a uttan mun til, hvat Nyrup ella Helveg hava sagt ella ikki hava sagt.

Skuldi hetta nú veri› sannleikin, hvat so vi› øllum teimum ættarli›um, sum nú hvíla undir grønum flagi og hava liva› eitt lív í tí trúgv, at tey vóru ein tjó›? Hvat vi› okkara skaldskapi og hvat vi› okkara mentan? Fór Poul F skeivur, tá hann kva›: "Vit eru føroyingar, serstøk tjó›"? Ella syngja vit eina lygn, hvørja fer› vit hábærsliga syngja okkara tjó›sang?

Sjálvandi gera vit ikki ta›, tí uttan mun til, hvat er sagt undir samrá›ingunum, so eru vit føroyingar ein tjó›. Og ta›, sum hevur stóran t‡dning í hesum sambandi er, hvat vit sjálvir siga og halda okkum vera. Eingin skal geva okkum anna› spjaldur, enn ta›, sum vit fingu frá okkara forfedrum. Lat okkum ikki av eini miseydna›ari samrá›ing knappliga missa okkara egnu sjálvsfatan.

Ta› frættist frá samrá›ingunum, at menn runnu aftur og fram vi› or›abókum, og ta› kann bert styrkja illgrunan um, at menn hava tosa› hvør sítt mál. Um ta› so er av tilvild ella ø›rum, skal eg lata ver›a ósvara›.

Kaga vit í Føroysk-Donsku or›abókina hjá M.A. Jacobesen og Chr. Matras so stendur, at føroyska or›i› tjó› merkir á donskum "et folk" ella "en nation". Hyggja vit so í Donsk-Føroysku or›abókina hjá Hjalmar Petersen so stendur, at danska or›i› "nation" á føroyskum merkir eitt fók ella ein tjó›.

So hesin bo›skapur er grei›ur. Ein tjó› = eitt fólk = ein nation. Og júst her liggur fellan, tí or›i› nation hevur á enskum tveir t‡dningar.

Enska mála› er eitt ótrúliga ríkt mál, tá ta› kemur til or›atilfar. Næstan hvør smálutur ella hvørt fyribrigdi hevur nógv ymisk heiti, og ta› er ein ørgrynna av or›um, sum merkja ta› sama ella á lei› ta› sama. Men ney›ars enska or›i› "nation" stendur rættiliga einsamalt og skal í veruleikanum bera t‡dningin av tveimum hugtøkum ella fyribrigdum. Bæ›i t‡dninginum ein tjó› ella eitt fólk, og so t‡dningin ein statur ella eitt sjálstø›ugt ríki.

So tá løgma›ur spyr danir, um vit føroyingar eru ein nation, so er stóri spurningurin, um mótparturin ikki, hvat hann ver›ur spurdur um. Eg haldi, at man t‡›iliga kann sta›festa, at løgma›ur spyr vi› rætta t‡dninginum av or›inum nation, nevniliga um vit eru ein tjó› ella eitt fólk. Men danir svara vi› einum ø›rum t‡dningi av sama or›i, nevniliga t‡dninginum at vera ein statur ella eitt sjálvstø›ugt ríki. Og hví hvørgin partur ikki beinanvegin fær or›askifti› inn á somu bylgjulongd, ta› fati eg ikki rættiliga. Men eftir stendur so, at løgma›ur spyr í eystur, me›an stjórnin svarar í vestur. Stutt sagt, menn tosa framvi› hvørjum ø›rum.

Sláa vit upp í English Dictionary um or›i› "nation", so standa tveit t‡dningar: 1) an individual country considered together with its social and political structures - 2) the people who live in a particular country.

Sagt ver›ur t.d., at "the president gave á speech to the nation", og tá hevur hann sjálvsagt ikki tala fyri áum, fjøllum og dølum, men fyri tjó›ini ella fólkinum.

Løgma›ur hevur spurt vi› tjó›art‡dninginum fyri eyga, me›an stjórnin svarar vi› ríkist‡dningi.

Hvítabók sera greitt á sí›u 102 og 103, har vit fult út lúka krøvini sambært altjó›arætti fyri at koma undir heiti› tjó› ella nation: føroyingar búgva í vælavmarka›um øki, ey›s‡ndur munur á tí fyrisitingarliga, politiska, løgfrø›isliga, búskaparliga, søguliga og mentunarliga økinum, umframt at vit føroyingar altí› hava kent okkum sum eina tjó› ella eina nation.

Men enska or›abókin er heldur ikki heilt røtt. Tí ein tjó› n‡tist ikki at búgva í einum og sama ríki. Ta› er ikki altí›, at landamørkini binda ymisku tjó›irnar saman. Men ta› er tvørturímóti teirra kenslur av, at tey hoyra saman. Ein felags identitetur, felags søga, felags mentan, felags mál o.s.v.

Ta› er væl eingin, sum ivast í, at vit eru føroyingar uttan mun til, um vit búgva í Føroyum ella í Danmark ella a›rasta›ir.

Veruliga fylgjast ríkismark og tjó›armørk rættiliga sjáldan. Vit hava m.a. sæ› fylgjurnar av hesum í syndarligu gongdini ni›ri á Balkan í 90´unum. Baskararnir eru ein tjó›, men búgva bæ›i í Spania og Fraklandi. Kurdar búgva í Turkalandi, Irak, Iran, S‡ria og Armenia. Gamla Sovjett var ein samgonga av nógvum statum, men vi› nógva fer›ir fleiri ymiskum tjó›um, nevniliga 120. Spyrt tú ein sama, um teir eru ein tjó›, so vil hesin siga, at ta› eru teir sjálvandi, men teir búgva í trimum ymiskum londum Finnlandi, Svoríki og Noregi.

Hin vegin kunna vit kanska siga, at tjó›in í T‡sklandi og tjó›in í Eysturríki er ein og sama tjó› ella nation, men teir búgva í tveimum ymiskum og sjálvstø›ugum nationum ella statum. Og taka vit Europa sum heild, so eru ta› í veruleikanum rættiliga fá ríki, sum bert hava eina og somu tjó›. Ísland er tó eitt døm, har ríki› og tjó›in fella saman.

So ta› er lætt at fara skeivur ella villast vi› hesum lítla fitta or›inum nation.

Hvat so vi› danska ríkinum?

Jú, síggja vit burtur frá t‡ska minnilutanum nor›an fyri marki›, so er púra greitt, at ta› búgva tríggjar tjó›ir ella tríggjar nationir í danska ríkinum: tann danska, tann føroyska og tann grønlendska.

Hetta er ein veruleiki, sum eingin má fáa loyvi til at seta spurnartekin vi›. Hetta er ein veruleiki, sum heldur ikki ein miseydna› samrá›ing, má fáa loyvi at sáa iva um.

Vi›víkjandi aling á Sandsvág

Sólvit Simonsen

Eg hev›i vænta at onkur fór at gera vi›merking til svari› sum Ey›un Viderø fekk frá Bjarna Djurholm landsst‡rismanni, men ikki so frætt sum løgtingsmennirnir fyri oynna, lótust um vón. Landsst‡risma›urin gevur eina forkláring sum sigur, at ikki skal komast ov nær lívfiskastø›ini í Skopun vegna sjúku. 10 km. skuldi fjarstø›an helst vera, hartil er at siga, at ímillum Hest og Skopun er 7 km. Av Argjum og til Skopunar eru ca. 16 km, haraftrat rekur vestfalli í Nólsoyarfir›i su›ur ígjøgnum fjør›in og so ví›ari vestur ígjøgnum Skopunarfjør›, so har kundi vandi veri› á fer›. Undan Árnabergi› vi› Sandsvág, har sum eg havi skilt ætlanin er at hava alingina, og vestur um Salthøvda og sí›an fram vi› landi og vesturum Trøllhøvda, og so innaftur á skopun eru 22 km. Hartil er at siga at vestfalli kemur skoldandi nor›ígjøgnum Skúvoyarfjør› og sí›ani vi› fullari fer› út av grunninum vestur í hav.

Og skal man fara hinvegin su›urum Dalsendan nor› vi› aftur landinum um Skálhøvda, Hvalnes og Streymnev og so innaftur á Skopun, tannvegin eru heilir 36 km, og haraftrat fer eystfalli trallandi eystur í havi›.

So eg haldi ikki at forkláringin hjá landsst‡rismanninum er serliga gó›. Annars tosar hann um at Sandoyggin skal møguliga fáa eina lívfiskastø› aftrat.

Tann í Skopun gevur arbei›i til 2,5 fólk, fáa vit eina aftrat so er arbei›i til 5 fólk í alt, ta› er b‡ti hjá Sandoynni burtur úr alingini.

Frábo›an

Føroya Arbei›arafelag
Kollafjar›ar Arbei›arafelag
Kollafjør›ur hin 30.11.2000

Nevndirnar í Føroya Arbei›arafelag og Kollafjar›ar Arbei›arafelag hava á fundi hóskvøldi› 30.11. 2000 vi›gjørt tí›indini um, at Havnar Arbei›smannafelag alment hevr bo›a› frá, at teir krevja at arbei›sfólki› í Kollafir›i skulu gerast limir í Havnar Arbei›smannafelag.

Vi›merkjast skal í hesum sambandi, at a›alfundurin í Kollafir›i tann 10. okt. 2000 tók undir vi› IKKI at fara upp í felagi› í Tórshavn.

Føroya Arbei›arafelag og Kollafjar›ar Arbei›arafelag skulu átala framfer›ina hjá lei›sluni í Havnar Arbei›smannafelag, sum hevur vent sær beinlei›is til Kollafjar›ar Arbei›arafelag, hóast lei›slan í felagnum í Havn er vitandi um, at Kollafjar›ar Arbei›arafelag er limur í Føroya Arbei›arafelag.

Vit meta ta› vera átalivert, solei›is at fara aftan fyri ryggin á Føroya Arbei›arafelag, og enn meira átaluverd er framfer›in, tá Havnar Arbei›smannafelag tykist at vilja tvinga arbei›sfólki› í Kollafir›i upp í felag teirra, í sta›in fyri at taka upp samrá›ingar um møguligar spurningar í sambandi vi› samanleggingina av Tórshavnar og Kollafjar›ar kommunu.

Vit skulu tí bo›a frá, at undirrita›u feløg ikki fara at gó›taka henda ágang frá Havnar Arbei›smannafelag, og vit ætla okkum at taka ney›ugu stigini um hesin ágangur heldur fram.

Fyrsta sjúkrali›i› í Føroyum

Nú er sjúkrali› í Vágum sum ta› fyrsta í landinum. Í gjárkvøldi var venjing undir heitinum »COOL«

TILBÚGVING
Ólavur í Beiti

Skei› hevur veri› í Vágum sí›an t‡sdagin og endar skei›i› í dag. Hetta skei› hevur veri› sum ein li›ur í Tilbúgvingarverkætlanini, og í gjárkvøldi skuldi so KOOL-funktiónin roynast. Hetta merkir í stuttum samskipan av sjúkrali›num vi› allar a›rar funktiónir í eini bjarging.

Og nú vi› endan av skei›num hevur Vágoyggin so fingi› ta› fyrsta Sjúkrali›i› í landinum sum telur 39 fólk tilsamans. Ta› eru læknar, tannlæknar, sjúkrasystrar og onnur hjálparfólk sum manna› hetta li›i›.

Medisinska upplæring

Sjúkrali›i› í Vágum hevur á skei›num fingi› medisinska upplæring og ein av fyrilestrahaldarunum var Finn Warburg, ortopædiskur skur›lækni frá Ríkissjúkrahúsinum, sum hevur fer›ast ví›a um lond og hildi› fyrilestrar. Finn Warburg hevur bæ›i veri› í Bosnia, Kongo og Afganistan og hildi› fyrilestrar í mediskari hjálp eftir vanlukkur av ymiskum slagi.

Ta› eru Jógvan Jensen og Johannes Nilssen frá Skei›tænastuni, i› bá›ir vóru vi› á skei›num nú, sum fingu Finn Warburg hendavegin at geva frálæru í hesum t‡›andi tátti í eini bjarging.

Klokkan 18.30 hendi ein flogvanlukka á flogvøllinum í Vágum og nú skuldi so roynast, um Sjúkrali›i› hev›i fingi› naka› burturúr skei›num. Venjingin hev›i ikki fingi› naka› navn, men skjótt samdust menn um bara at nevna hana »COOL«.

Elisabeth Thorsteinsson, kommunulækni, og Karl Johan Nielsen, tannlækni, eru vi› í sjúkrali›num í Vágum
Mynd: Ólavur í Beiti

Finn Warburg, ortopediskur skurlækni, hev›i fyrilestrar á skei›num í Vágum. Aftanfyri sæst Jógvan Jensen frá skei›tænastuni á Landssjúkrahúsinum, sum skipa›i fyri skei›inum
Mynd: Ólavur í Beiti

Jólasjónleikur á Meiarínum

Leygardagin og sunnudagin kl. 16 spælir Gríma jólasjónleik vi› søgu og sangi á Meiarínum.

Jólaløtan er hugsa børnum frá 3 ár og uppeftir.

Ta› er lítla Mirabella sum er so spent til jóla at hon klárar ikki at bí›a – men so hendir naka› sera løgi› og Mirabella sleppur rættiliga at royna seg.

Og tann lítla gentan vi› svávulpinnunum, eftir H. C. Andersen ver›ur eisini at síggja. Og børnini mugu sanniliga hjálpa til tá á stendur. Tey sum spæla vi› eru Birita Mohr og Ria Tórgar›. Spælt ver›ur hetta vikuskifti› og næsta vikuskifti› 16. og 17. des. kl. 16.

Atgongumerki á 50 kr. fáast á Kunningarstovuni tlf. 315788 og vi› dyrnar ein tíma á›renn.

HEIMA BIO



Í Gundadali tel. 31 47 70
Í Kollafirði tel. 42 10 83
Í Saltangará tel. 44 91 33
Í Klaksvík tel. 45 73 53
Í Sørvági tel. 33 20 01
Í Leirvík tel. 44 33 60
Í Skálafirði tel. 44 12 00

STATOIL

st irnar ring lan i